## DAGSINS MEINING

# Heimastýrissamgonguskjal

Stórur munur er á nýggja samgonguskjalinum og tí gamla. Fullveldi er ikki nevnt við einum orði, og tosað verður nú um »at Føroyar gerast sjálvbjargnar, so Føroya fólk uttan fíggjarligar og umsitingarligar bindingar kann gera av framtíðarstøðu sína«. Henda orðing eru ivaleyst fá, ið kunnu verða ósamd í. Hvør vil ikki arbeiða móti sjálvbjargni? Hvør kann hava nakað ímóti at gera tað undir heimastýrislógini? Hetta má sigast at verða eitt heimastýrissamgonguskjal. Áhugavert er at síggja at samtyktin um sjálvstýri Føroya fólks ikki verður fylgd, tá tað kemur til yvirtøkuárstøl, tí eftir øllum at døma skal løgregla og rættarskipan ikki yvirtakast í hesum valskeiðnum, hóast arbeiðið at fyrireika hesar yvirtøkur skal halda fram. Tá henda samgongan ikki vil fylgja samtyktini, so verður trupult av henni at krevja av framtíðar samgongum, at tær gera tað.

Útyvir at verða eitt heimastýrissamgonguskjal, so eru nøkur skilagóð átøk at síggja. Gleðiligt er at síggja, at Heimarøktin skal víðkast til at umfata samdøgursrøkt og at rætturin til barnsburðarfarloyvi skal víðkast til 52 vikur, hóast teir ikki vilja gjalda fyri 52 vikur beinanvegin. Áhugavert verður eisini at síggja, hvussu almennu tænasturnar skulu betrast fyri borgaran við endurskoðan av almenna bygnaðinum.

Miðflokkurin hevur fingið nakrar orðingar í samgonguskjalið. Eitt nú leysu orðingarnar um at fjálga um familjuna og, at arbeitt verður fyri at avmarka talið av fosturtøkum. Tað er neyvan nakar, ið hevði sagt tað øvugta.

Sjálvstýrisflokkurin fær oljumál, og har heldur núverandi politikkur fram. Vónandi fara breiðar semjur framhaldandi at merkja politikkin á hesum øki. Hóvliga heimastýrisorðingin í samgonguskjalinum má eisini hóva hesum flokki væl.

Tjóðveldisflokkurin eigur okkurt fingramerki í samgonguskjalinum, men sigast má, at tey borgarligu fingramekrini eru tey, ið síggjast best. Av fingramerkjum, ið kunnu hava uppruna í Tjóðveldisflokkinum kunnu nevnast brotying í lóg um Húsalánsgrunnin, og at fyrireikingar til Tjóðleikpall Føroya skulu byrja. Onkrar góðar intentiónir hava helst sín uppruna í vinstravonginum í Tjóðveldisflokkinum, men tíverri eru orðingarnar sera leysar sum t.d. tá mál skulu loysast »við raðfestari íløguætlan«.

Privatisering og landbúnaðarlóggáva er nakað sum Fólkaflokkurin hevur staðið á odda fyri, so har krevst, at man verður á varðhaldi, so at landins fyritøkur og dalar og fjøll ikki verða latin teim fáu fyri lítið og lætt. Eisini vil man stovnseta virðisbrævamarknað Føroya. Tað eru tey, ið halda, at størri fyritøkur høvdu staðið seg betur at skrásett seg á størri børsum, eisini tá hugsað verður »insidara« og gegnistrupulleikar. Um dupultmoralska orðingin um »í fríari altjóða kapping«, ið Fólkaflokkinum dámar so væl, merkti nakað, so hevði ein Føroyskur partabrævamarknaður neyvan komið uppá tal, uttan so at tað skuldi staðið einum og hvørjum frítt at handla har – eisini útlendskan kapital. Vilja vit føroyingar tað?

Alt í alt eitt heimastýrissamgonguskjal við borgarligari slagsíðu. Vónandi fáa vit eitt sakligt og breitt orðaskifti um samgonguskjalið komandi tíð, nú hetta er grundarlagið undir komandi politikkin hjá samgonguni. Sum blað vilja vit fegin geva okkara íkast til hetta tjak og bjóða lesarum og viðmerkjarum vælkomnar at vera við í orðaskiftinum um landsins og tína og mína framtið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

VERKFALLSRÆTTURIN

# Álop á grundleggjandi rættindi hjá fakfeløgum

**Føroya Arbeiðarafelag**
*Stjórnin*

Verkfallið hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum endaði herfyri tykist ikki bert at hava loypt øði í ávísar politikarar, men hetta verkfall hevur eisini avdúkað hvussu lítla virðing verandi samgonga hevur fyri grundleggjandi rættinum hjá fakfeløgum, at stríðast fyri sømuligum arbeiðs- og lønarkorum.

### Rætturin at lýsa verkfall

Líka frá tí at løntakarar tóku seg saman í fakfelag hevur verið alment viðurkent, at feløgini høvdu ein demokratiskan rætt at seta í verk arbeiðssteðg t.v.s. verkfall, tá sáttmálaloysi var.

Hetta er eisini heilt náttúrligt, tí hetta er einasta amboð sum verkamannafjøldin hevur tá hon skal royna at vinna limum sínum rímulig arbeiðs- og lønarkor.

Áður hava sjálvt teir mest afturhaldssinnaðu politikarar bæði í Føroyum og í grannalondum okkara virt henda verkfalssrætt hjá fakfeløgunum, men nú eru aðrir tónar at hoyra.

Í sambandi við tað øsing móti føroysku fakfelagsrørsluni, sum ikki minst verandi samgonga við Karsten Hansen, landsstýrismanni á odda, roynir at skapa millum manna, er tað sera týdningarmikið fyri vanliga føroyingin at hava í huga, at tað er samanhaldið millum føroysku løntakararnar, sum er einasta grundin til, at arbeiðs- og lønarviðurskiftini hjá vanliga løntakaranum í dag eru so fræg sum tey eru.

Arbeiðsgevaraparturin og makthavararnir hava í øldir roynt at billa fólki inn, at tey ikki hava tørv á tí samanhaldi, sum skipanin í fakfelag er besta trygdin fyri.

Tey sum hava roynt at sita yvir av privatu og almennu arbeiðsgevarunum við samráðingarborðið vita av royndum, at uttan slit og bit fæst ikki ein króna afturat lønini ella eftirlønini, og tí er tað einki annað enn kávalótir, tá t.d. fíggjarmálaráð-harri okkara alment tosar um at vísa vilja at geva alment løntu starvsfólkunum sømulig arbeiðs- og lønarkor.

Hvør hevði ábyrgdina av at verkfallið vardi so leingi?

Øll fakfelagsfólk munnu vera á einum máli um, at eitt verkfall skal raka hart, tí bert á henda hátt kann arbeiðsgevaraparturin tvingast aftur til samráðingarborðið og avleiðingarnar av verkfallinum gerast minst møguligar.

Á hendan hátt gerst verkfallið ikki longur enn neyðugt, og kemur harvið í minst møguligan mun at raka vanliga føroyingin, sum jú í nógvum førum ikki er partur í ósemjuni millum samráðingarpartarnar.

Ónøgdin hjá vanliga føroyinginum er vælskiljandi, tá hann verður raktur av avleiðingunum av einum verkfalli, men flest allir føroyingar munnu skilja, at tað er ein demokratiksur rættur hjá fakfeløgunum, at lýsa verkfall, tá arbeiðsgevaraparturin ikki vísir vilja at gera semju um nýggjan sáttmála.

Høvuðsorsøkin til, at verkfallið hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag dróg út var tann, at tað við einari merkisverdari ódámligari framferð eydnaðist lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum við Karsten Hansen á odda, at fáa vent føroysku fólkafatanini móti Føroya Skipara- og Navigatørfelag og hinum føroysku fakfeløgunum.

Okkara fíggjarmálaráðharri førdi undir verkfallinum fram, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag kravdi 75% í lønarhækking, hóast hann var vælvitandi um, at hetta í besta føri bert var ein hálvur sannleiki.

Veruleikin er tann, at limirnir í Føroya Skipara- og Navigatørfelag í ólukkumát eru afturútsigldir í mun til starvsfelagar í grannalondum okkara, og eisini í mun til starvsfelagar í privatu sjóvinnuni.

Tað verður tagt burtur, at lønardeildin í øllum farna valskeiði hevur víst eitt sera vánaligt handalag, tá talan var um at samráðast við fakfeløgini.

Okkara fíggjarmálaráðharri tykist hava lítið skil fyri samráðingartaktikki, tá hann soleiðis tilvitað fer út í fjølmiðlarnar við beinleiðis niðurgerandi viðmerkingum um samráðingarmótpart sín. Tað skal ikki nógv skil til fyri at duga at síggja, at slík framferð ikki kann annað enn gera tað meira torført at fáa í lag eitt skilagott samskifti millum samráðingarpartarnar.

Vit kunnu enn tann dag í dag fara inn á heimasíðuna hjá lønardeildini, har sokallaða kunningin enn stendur svart upp á hvítt.

### Verkfallsbrótararnir

Áhaldandi ágangurin móti fult lógliga verkfallinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur uttan iva beinleiðis birt upp undir, at tíggjutals bátar tóku upp fólka- og farmaflutningin, sum raktur varð at verkfallinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Tað er átaluvert, at fólk gera sær dælt av einari verkfallsstøðu, og soleiðis tilvitað ella ótilvitað hava medvirkað til at verkfallið gjørdist longur enn neyðugt.

Lønardeildin hevur helst gníggjað sær í lógvarnar av frøði um at tað eydnaðist teimum at fáa fólk at bróta verkfallið, tí hetta var liður í politikkinum hjá lønardeildini og fíggjarmálaráðharra okkara, nevniliga at royna at draga verkfallið út, soleiðis at teir enn einaferð kunnu fara í fjølmiðlarnar við lygusøgum sínum um, at fakfeløgini ikki eru at samráðst við.

Vit ætla ikki at leggja verkfallsbrótararnar undir, at teir sleppa sær undan skattaskyldu sínum, men tað hevði verið forvitnisligt at frætt hvat Toll- og Skattstova Føroya, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eisini hevur ábyrgdina av, hevur gjørt fyri at kanna um inntøkurnar, sum vunnar eru í sambandi við verkfallsrakta arbeiði, er givnar upp til skattingar, onki er í hvussu so er frætt hvat Toll- og Skattstova Føroya ætlar at gera við hetta mál.

### Ágangurin frá Fíggjarmálastýrinum.

Vanligt verður sagt, at tá semja er fingin í lag og nýggjur sáttmáli er skrivaður undir, so er friður og ikki er vanligt at almennur myndugleiki, aftan á at semja er fingin í lag, fer í fjølmiðlarnar við útspillingarherferð móti samráðingarmótparti sínum.

Hesa siðvenju hevur Karsten Hansen ikki ætlanir um at fylgja, tí hann fær nærum eina heila síðu í málgagni Tjóðveldisflokksins Fregnum nr. 19, har hann, væl hjálptur av einum av blaðfólkunum, oysir gor og gall út yvir Føroya Skipara- og Navigatør-felag og m.a. skuldsetir hetta felag fyri at vera tiltikið fyri at hava nógv gerðarættar-mál og at royna at mjólka skipanini.

Hesin politikarin, sum mótvegis almenninginum altíð tykist royna at standa sum tann peni og rættvísi, vísir her veruliga hógvar sínar.

Hví skal Karsten Hansen draga fram mál sum als einki hava við farnu samráðingarnar og verkfall at gera?

Hevur Karsten Hansen gloymt, at tað er hann sum av fyrstan tíð avgjørdi at senda fútarættin eftir fakfeløgunum? Hevur hann eisini gloymt, at tað var hann sum tók stig til at leggja málið um Brimil fyri Løgtingið?

Tað er bæði láturligt og grátuligt, tá Karsten Hansen í fjølmiðlunum rósar sær av, at »bert« 6 verkføll hava verið í hansara tíð sum fíggjarmálaráðharri.

Tað er ein royndur lutur, at arbeiðsgevarapartur sum ikki hava evni ella vilja at fáa í lag sáttmálar við fakfeløgini, snildisliga royna at snara veruleikanum soleiðis at tað skal síggja út sum at fakfeløgini og fakfelagsleiðararnir eru teir sum hava alla ábyrgdina av støðuni, tá semja ikki fæst í lag um nýggjan sáttmála.

Tað er tó ein sannroynd, at tað neyvan hava verið so nógvar ósemjur á arbeiðsmarknaðinum sum júst undanfarna valskeið, og hetta hevur Karsten Hansen og lønardeild hansara høvuðsábyrgdina av.

Endamálið við hesari útspilling er tó lætt at avdúka, tí hóast fíggjarmálaráðharrin ikki vil siga tað beinleiðis, so er eingin ivi um, at hann, á sama hátt sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur meldað út, vil skerja verkfalssrætt okkara.

### Hvat siga hinir politisku flokkarnir?

Nú bæði Fíggjarmálastýrið og Føroya Arbeiðsgevarafelag tykjast at vilja royna at skerja verkfallsrættin hjá føroysku fakfeløgunum, so halda vit at tað er skyldan hjá politisku flokkunum alment at boða frá, um hesir flokkar taka undir við hesari herferð móti føroysku fakfelagsrørsluni, ella um hesir flokkar eru sinnaðir at verja demokrat-iska rættin hjá fakfeløgunum at lýsa verkfall, tá sáttmálaloysi er.

Læran av verkfallinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Verkfallið sum endaði fyri nøkrum døgum síðani hevur enn einaferð víst okkum, at tað er alneyðugt, at føroyska fakfelagsrørslan stendur saman, tí bert á henda hátt kunnu vit forða fyri, at Lønardeildin, væl hjálpt av privatu arbeiðsgevarunum, fer at skerja verkfallssrætt okkara.

Eisini er neyðugt, at vanligi løntakarin dugir at síggja kávalóturnar hjá fíggjarmálaráðharranum, og snildisligu royndir hansara at venda almenninginum móti fakfelagsrørsluni, tá hann sjálvur og stýrið hansara ikki hava vilja ella evni at fáa í lag semjur við fakfeløgini.

Vit skulu avgjørt ikki undirmeta tær kreftir í samfelag okkara, sum vilja stríðast fyri at taka frá okkum grundleggjandi rætt okkara at lýsa verkfall og onnur grundleggj-andi rættindi okkara.

Fíggjarmálaráðharrin hevur víst, at tað sum hann ikki kann fáa framt við samráðingum, tað vil hann royna at vinna sær á annan hátt, og fútarætturin er helst bert byrjanin. Her hava privatu arbeiðsgevararnir greitt meldað út, at teir fara at brúka dómsstólsskipan okkara á sama ódámliga hátt sum fíggjarmálaráðharri okkara hevur lagt lunnar undir.

Fakfeløgini og vanligi løntakarin hava alla grund til at taka hesar hóttanir frá arbeiðsgevarasíðuni í stórsta álvara.

Á Stjórnarfundi 31. mai 2002.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## Skeivur Páll

Í blaðnum hósdagin prentaðu vit eitt lesarabræv hjá Páll Poulsen. VIð greinina stóð mynd av Páll Poulsen í Kollafirði. Tað var tó ikki hann, ið skrivað hevði brævið, men Páll Poulsen í Havn. Vit biðja orsaka mistakið!

***blaðstj.***



## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyarsiglingin einaferð enn

**Ingeborg Vinther**



Fyri stuttum varð gor og gall oyst útyvir Skipara- og Navigatørfelagið, teir vóru í verkfalli tí ongin sáttmáli fekst við Fíggjarmálastýrið. Sjálvandi var hetta ringt fyri okkum øll ið búgva í Suðuroy, men tað bleiv gloymt at tað vóru tveir partar í sakini nevnliga Fíggjarmálastýrið ið var partur av samgonguni, somu samgongu, ið enn tvíheldur um maktina. Nú er verkfalli av, men støðan er verri nú, tí undir verkfallinum visti vit at ongin Smyril sigldi, nú veit man ikki nær sleppast kann um Suðuroyarfjørð, tí fyrst kom Scandia ið skuldi verða leiga til sigling tá Smyril fór í dokk, hetta segði stjórin fyri Strandferðsluna, men gakk ein túr kláraði hendan rullubukkan til Suðuroynna og norð aftur um fjørðin. Eg var sjálv við hendan túrin norð í fínasta veðri, komin á Drelnes standa trailarir og bilar hjá IRF ið skuldi norð við Scandiu, men teir fingu at vita at hetta ber ikki til tí onki var at surra fast á dekkinum og Scandia rullaði ov illa, bert persónbilar sluppu við, men nær og hvussu vit skuldi fáa bilarnar suður aftur, meðan Smyril er í dokk og farmur verður tikin fram um, tá nøkur sigling er, segði søgan onki um.

### Er Suðuroyggin partur av Føroyum ?

Ja, sum skattaborgarar í landinum má man spyrja - eru vit ið búgva á Suðuroynni partur av hesum landi ? tað sær ikki soleiðis út, sum fólkið og oyggin verða viðfarin av politiska valdinum, hesa viðferð fáa vit í búgva har suðuri hvørja fer Smyril fer í dokk. Vinnumálastýrið hevur SL undir sær t.v.s. Vinnumálastýrið hevur politisku ábyrgdina ella hvar skal ábyrgdin fyri hetta óskil leggjast ? SL og teir ið hava ábyrgdina har, vistu áðrenn teir settu Scandiu í sigling, at onki kundi surrast fast á dekkinum, so skipið kundi ikki taka farm. Ella varð hetta gjørt fyri at lumpa Dúgvuna inn í Suðuroyarsiglingina, eitt skip sum er líka óbrúkligt til hesa sigling sum Scandia og tað veit bæði Strandferðslu stjórin og teir ið eru á Strandferðsluni.

Landstýrismaðurin í Vinnumálum Bjarni Djurholm, segði í Degi og Viku hóskvøldið 23. mai, at trupulleikin var ikki pengar, tí SL hevði fingið neyðuga peningin játtaðan, meðan stjórin á SL Reidar Nónfjall sigur, at tað er tí at peningurin var ikki játtaður til tíðina, og tí var ikki møguligt at leiga hóskandi skip. Ja, hvør skyldar uppá hvønn annan, men onkur man hava ábyrgdina og tann ið ábyrgd hevur eigur at fáa avleiðingar um tað so er stjórin ella landsstýrismaðurin.

Betur um Suðuroyarsiglingin verður løgd á ein almennan stovn í Suðuroy.

Tað er nokk besta loysnin sum hevur verið frammi nú um dagarnar, at øll umsitingin av Suðuroyarsiglingini bleiv løgd á ein almennan stovn í Suðuroy, so bleiv betur skil á, tí hetta óskil ið nú er kann ongin av okkum liva við. Hvørja fer Smyril fer í dokk verða vit sett eini 50 ár aftur í tíðina, skip verða sett til Suðuroyarsiglingina í als ikki kunnu nýtast til hesa sigling, Dúgvan er bart út sagt vandamikil bara tað er eitt sindur av vindi og óslatt er í sjónum.

### Ein undrast

Fólk spyr seg sjálvan og undrast yvir hvussu leingi skal hetta óskil halda fram? hvør hevur ábyrgdina? fær hetta avleiðingar?

Umberingar kunnu ikki góðtakast, tí SL veit, at hetta endurtekur seg á hvørjum árið, at vit sum búgva í Suðuroy ikki hava nakran ordiligan fart um Suðuroyarfjørð tá Smyril fer í dokk. Hvørt ár er sama umbering, at onki skip fæst til leigu ið er brúkligt.

Um hetta gekk soleiðis fyri seg í einum av grannalondum okkara ella kanska bara hetta hendi við siglingini til norðuroyggjar, høvdu teir ið sótu við ábyrgd av hesum óskili langt síðani fingið sekkin frá sínum arbeiðsgevara, men tíverri, her á landi gongur næstan alt og sum nú er gongur hetta útyvir okkum – enn einaferð – ið skulu ferðast aftur og fram til arbeiðis hvørja viku og útyvir tey sum hava onnur ørindi til Havnar og ikki minst vinnulívi ið nú má gjalda dýrt tí ongin kann stóla uppá regluliga sigling og farmaflutning nú onki brúkligt avloysara skip er.

Nú mátti verið tí uppá, at teir ella tey ið hava ábyrgd av hesum, eisini fáa avleiðingar av at ein heil oyggj verður hildin soleiðis fyri gjøldur á hvørjum árið.

Eisini skal ein áheitan vera til teir politikkarar ið valdir eru har suðuri, nú mugu tit støðga hesari vanvirðing av okkum ið skuldu eitast at vera borgarar í hesum landi, tað eru vit í hvussu so er roknaði fyri at verða tá vit skulu gjalda okkara landsskatt.

Eitt orðatak sigur »ger tínar skyldu og krev tín rætt«, vit í Suðuroy gera okkara skyldir, men tá tað kemur til at fáa sín rætt, gongur tað ikki so væl. Siglingin um Suðuroyarfjørð er okkara koyrivegur til meginøki, vit hava sama rætt sum aðrir føroyingar til at krevja at hesin vegur verður hildin farbarur av landsins myndugleikum.

Tí mugu tit, ið sita á Føroya Løgtingið og valdir av okkum í Suðuroy, gera tykkara skyldur og fáa skil á hesi viðurskifti og krevja at hetta ið nú aftur hendi við Suðuroyarsiglingini fær tær avleiðingar tað eigur at fáa, har ábyrgdin liggur.

Tórshavn, tann 24. mai 2002

*PS: Hoyri nú í morgum, at SL boðar frá at nú verður skift aftur í Suðuroyarsiglingini, so ein rullubukka avloysir eina aðra av til Smyril kemur aftur – stór skomm fyri landsins myndugleikar.*

# Kirsten Brix skrivað Ph. d-ritgerð um prosuskaldskapin eftir Regin í Líð

**Føroya Fróðskaparfelag hevur givið út bókina Dialog i Babelstårnet. Analyse af Regin í Líðs fiktive prosaforfatterskab eftir Kirsten Brix. Henda bók er ritgerð, ið er góðkend til verju á ph.d.-stigi á Fróðskaparsetri Føroya. Bókin er nr. 34 í Supplementa-røðini hjá felagnum**

**BÓKMENTIR**
*Tíðindaskriv*

Hetta er triðju ferð, at ph.d.-verja er við Fróðskaparsetur Føroya. Tann fyrsti var Jóannes Dalsgaard, sum í 1997 vardi ph.d.-ritgerð við heitinum Fylking, ið var ein rannsókn av verkamannarørsluni á Tvøroyri. Tann næsti var Andras Mortensen, sum í 2000 vardi ritgerð við heitinum Hin føroyski róðrarbáturin. Sjómentir føroyinga í eldri tíð. Henda ritgerð var nr. 26 í Supplementa-røðini.

Ritgerð Kirsten Brix er um prosuskaldskap Rasmus Rasmussens. Rasmus Rasmussen var undangongumaður av teimum sjáldsomu. Saman við Símuni av Skarði setti hann Føroya Fólkaháskúla á stovn í 1899. Hesin skúlin varð ein av hornasteinunum í arbeiðinum hjá tjóðskaparrørsluni. Hann undirvísti og skrivaði lærubøkur, var skrivari í Føroya Fiskimannafelag, limur í Løgtinginum og skrivaði ein hóp av greinum um m.a. politiskar og mentanarligar spurningar. Um somu tíð arbeiddi hann vísindaliga við plantufrøðiligum evnum og gav í 1936 út meginverkið Føroya Floru.

Undir dulnevninum Regin í Líð skrivaði og týddi hann bókmentir, eitt nú norrønar klassikarar sum Vøluspá og Hávamál.

Eisini sum fagurbókmentaligur rithøvundur skrivaði Regin í Líð slóðbrótandi verk. Stuttsøgur hansara eru byrjanin til nútímans prosuskaldskap í føroyskum bókmentum. Hann skrivaði ta fyrstu skaldsøguna, Bábelstornið, eina naturalistiska skaldsøgu um tað tjóðskaparliga stríðið fram til 1906. Sum tann fyrsti føroyski rithøvundurin lýsir hann, við støði í einum føroyskum samtíðarveruleika, nútíðarmenniskjað sálarfrøðiliga. Í Dialog i Babelstårnet verður tann bókmentaligi hugaheimurin hjá høvundinum granskaður, hann verður settur í samband við virki høvundsins í tjóðskaparrørsluni og við samtíðarbókmentalig rák í norðurlendskum og evropiskum bókmentum.

Týðingin av skaldsøguni til danskt, sum høvundurin sjálvur greiddi úr hondum, og sum fólk hava hildið vera horvna, er komin undan kavi. Í einum sjálvstøðugum kapitli verða upprunaskaldsøgan og týðingin samanbornar og mettar.

Í einum uppískoyti aftast í bókini eru stuttsøgurnar í danskari týðing.